# Byggiætlan fyri




*Tað var Heðin Mortensen, sum setti hol á byggiarbeiðið Undir Kongavarða, har 200 raðhús og 76 íbúðir fara at standa í 2012*

**"Undir Kongavarða" er største byggiætlanin av sínum slag í Føroyum nakrantíð. Kostnaðurin kemur at liggja um eina hálva milliard krónur. Bygt verður í fýra stigum, og um ársskiftið 2011/2012 standa 276 bústaðir klárir skamt frá Argjum**

BYGGING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Tórshavn:** Íbúðirnar fara at kosta millum 600.000 krónur og 4,5 milliónir krónur. Støddin verður millum 46 fermetrar og slakar 200 fermetrar. Hesar íbúðirnar upp á 200 fermetrar vera marglætis íbúðir, og tað eru tær sum fara at kosta 4,5 milliónir krónur.

Raðhúsini fara at kosta millum 2,4 og 2,9 milliónir krónur, og verða tvey snið at velja í millum. Annað modellið verður 149 fermetrar til støddar, og hitt modellið verður 133 fermetrar við einum óinnrættaðum kjallara upp á 74 fermetrar.

Bygt verður í fýra byggistigum. Jørðarbeiðið byrjar í dag, og fyrsta byggistig skal ætlandi vera liðugt á vári 2009. Tá skulu 32 raðhús og 5 íbúðarbygningar við tilsamans 45 íbúðum standa klárar.

Tá øll verkætlanin er liðug um árskiftið 2011/2012 standa gott 200 raðhús og 76 íbúðir skamt frá Argjabygd, stutt norðan fyri Hamaran.

### Pakkaloysn

Byggiharri er Valbjørn Dalsgarð og saman við Selmar Nielsen, arkitekti, er hann høvuðsmaðurin handan stóru byggiætlanina, sum er tann største av sínum slag í Føroyum nakrantíð.

Ein ætlan sum inniber, at tað um góð tvey ár standa 77 bústaðir klárir at flyta inn í úti á Argjum.

– Talan verður um eina pakkaloysn frá byrjan til enda, sigur Valbjørn Dalsgarð, byggiharri, so tað vera bara møblar, sum skulu inn í bústaðirnar aftrat, tá teir eru keyptir.

Arkitektur og ráðgevi í verkætlanini er Selmar Nielsen.

– Býlingurin verður býttur í tveir partar, og í hvørjum av býlingunum verður eitt grønt øki, segði Selmar Nielsen á tíðindafundinum í høvuðssætinum hjá Eik Banka úti við Strond í Havn.

Hann greiddi nærri frá staklutum í verkætlanini. Millum annað, at býlingurin skal hava sína egnu hitamiðstøð, og á tekjuni á henni kemur ein lítil fótbóltsvøllur at liggja, til børnini at spæla á.

Eisini segði hann frá, um hvussu húsini koma at síggja út.

– Vit hava gjørt eina varieraða framsíðu av húsunum móti býnum. Niðan eftir verður so sólterassa og eitt bilskýli. Allastaðni vera stór vindeygu við góðum útsýni yvir Nólsoyarfjørð, segði Selmar Nielsen og legði dent á, at bæði íbúðirnar og raðhúsini fara at hava eitt flótandi rúmforløb, sum hann rópti tað.

Selmar Nielsen segði, at teir valdu at nýta viðlíkahaldsfrítt tilfar so nógv sum gjørligt.

– Tað verður lætt at viðlíkahalda húsini, segði Selmar Nielsen sum eisini staðfesti, at stóru vindeyguni halda til føroyska veðurlagið.

### Alt jørðarbeiði í einum

Høgni Lauritsen er verkætlanarleiðari og kundi boða frá, at jørðarbeiði byrjar í dag, og so verður sprongt og planerað. Høgni Lauritsen segði, at alt jørðarbeiðið verður gjørt um eina leið, soleiðis at tey sum flyta inn, tá fyrsta byggistig er liðugt, ikki verða órógvaði av tungari ferðslu og tí sum har til hoyrir, tá jørðarbeiði vanligt verður gjørt.

Somuleiðis greiddi hann frá, at teir fara at nýta elementir í so stóran mun tað er gjørligt. Gongst sum ætlað, byrjar uppsetingin av teimum longu komandi ár.

### Skúli og barnagarður á økinum

Við á tíðindafundinum í

## FAKTA

Byggiharri er Valbjørn Thomsen
Arkitektur og ráðgevi er Selmar Nielsen
Projektleiðari er Høgni Lauritsen
Fíggjarligi veitarin er Eik Banki
Samlaði kostnaðurin fyri verður uml. ½ milliard krónur
Bíligasta íbúðin kostar 600.000 krónur
Dýrasta íbúðin kostar 4,5 milliónir krónur
Minsta íbúðin verður 46 fermetrar
Størsta íbúðin 193,5 fermetrar
Raðhúsini kosta millum 2,4 og 2,9 milliónir krónur
Raðhúsini vera 149 fermetrar og 133 fermetrar + kjallara